ALMANNA- OG HEILSUMÁLARÁÐIÐ

Tórshavn, tann 11. januar 2005
J.Nr.: 0.02-200400875/2
(at tilskila í svari)

Viðgjørt: KWP

Tygara skriv:

# Norðurlandasamstarvið í Nordisk Ministerråd 2004

## Frágreiðing frá Almanna- og heilsumálaráðnum

Almanna- og heilsumálaráðið luttekur í norðurlendsum samstarvi innan almanna- og heilsumál, javnstøðumál, byggi- og bústaðarmál og innan arbeiði móti narkotika-nýtslu. Harumframt luttekur Almanna- og heilsumálaráðið í norðurlendskum samstarvi um hagtøl á almanna- og heilsuøkinum.

## Almanna- og heilsuøkið

### EK-S

Almanna- og heilsumálaráðið luttekur í samstarvinum innan almanna- og heilsuøkið. Embætismannanevndin EK-S, tað er Embetsmannakommitteen for Social- og helsespørgsmål, kemur vanliga saman tvær ferðir um árið og er mannað við umleið 5 embætisfólkum frá hvørjum Norðurlandi. Almanna- og heilsumálaráðið luttekur vanliga við einum umboði í nevndini.

Grundarlagið undir samstarvinum í 2004 á almanna- og heilsuøkinum hevur verið ein samstarvssætlan fyri tíðarskeiðið 2001-2005. Høvuðsøkini í hesari ætlan eru:

- at beina burtur forðingar fyri at at flyta millum Norðurlond
- at menna tey norðurlendsku vælferðarsamfeløgini í sambandi við nýggjar evropeiskar og altjóða avbjóðingar.
- at menna tað norðurlendska samstarvið við tey norðurlendsku nærumhvørvini
- at býta um tilfar um almanna- og heilsuøkið og at kunna um royndir, sum hvørt einstakt landið hevur á økinum

Í 2004 hevur Ísland havt formansskapin. Innanfyri yvirsskipaða grundarlagið á almanna- og heilsuøkinum raðfesti Ísland serliga at arbeiðast skuldi við hesum økjum í 2004:

- at betra um fólkaheilsuna
- at samstarva meira innan telduøkið á almanna- og heilsuøkinum
- at menna samstarvið við nærumhvørvini
- at betra um tænastuna hjá børnum við serligum tørvi
- at betra um arbeiðið ímóti rúsevnanýtslu

- at arbeiða við starvsfólkapolikki innan almanna- og heilsuøkið
- at samskipa eldrarøkt

**Samstarv**

Sum ítøkiligt dømi um samstarv innan økini, ið nevnd eru omanfyri, kann nevnast, at ein arbeiðsbólkur undir embætismannanevndini arbeiðir við at fáa felags standardir fyri at máta góðskuna í heilsuverkinum. Vegna vantandi arbeiðsorku luttekur Almanna- og heilsumálaráðið ikki beinleiðis í hesum arbeiði, men hevur gjørt avtalu um at fáa tilfar frá fundunum, soleiðis at fylgt kann verða við hesum arbeiði. Seinni skal støða takast til, um Føroyar skulu nýta teir standardir, ið nevndin kemur fram til.

Sum eitt annað dømi kann nevnast, at ein stór granskingarverkætlan er sett í verk, har granskað verður í teimum norðurlendsku vælferðarmodellunum. Ein verkætlan í tí samlaðu verkætlanini snýr seg um "útnorðurlendsk vælferðarpolitisk viðurskifti, Føroyar, Grønland og Ísland". Føroyar luttaka í hesi verkætlan.

Í 2005 hevur Danmark formansskapin í Nordisk Ministerråd. Í hesum sambandi hava Danmark og Føroyar gjørt avtalu um, at ráðharrafundurin á almanna- og heilsuøkinum verður hildin í Føroyum 13.-15. juni 2005.

## Javnstøða

### EK-JAM

Almanna- og heilsumálaráðið luttekur í samstarvinum um javnstøðu í Nordisk Ministerråd. Fulltrúin luttekur á fundum í EK-JAM, sum er embetsmannakommittén for jamstalldhet. Í 2004 luttók føroyski fulltrúin á tveimum fundum í EK-JAM. Harumframt luttóku landsstýrismaðurin, aðalstjórin og fulltrúin á ráðharrafundi í Reykjavík í september 2004.

Grundarlagið undir arbeiðinum hjá EK-JAM er ein virkisætlan fyri norðurlendskt samstarv á javnstøðuøkinum fyri árini 2001 til 2005. Høvuðsøkini í hesari virkisætlan eru:

- Kyns- og javnstøðuperspektiv í norðurlendskum búskaparpolitikki
- Menn og javnstøða
- Harðskapur móti kvinnum

Onnur øki, ið eru høgt raðfest í virkisætlanini, eru javnstøða á arbeiðsmarknaðinum, ungdómur og javnstøða, og lønarmunur vegna kyn. Arbeitt verður við nógvum verkætlanum í samsvari við virkisætlanina. At taka lut í verkætlanum er orkukrevjandi, bæði hvat fígging og arbeiðsorku viðvíkur. Við okkara lutfalsliga avmarkaða tilfeingi ber ikki til at luttaka í øllum verkætlanunum.

### Verkætlan Pornografi og ungdom

Landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum gjørdi av at lata kr. 30.000,- í fígging til eina granskingarverkætlan, fyri at føroyskir granskarar fáa møguleika at luttaka í verkætlanini. Talan er um eina verkætlan við heitinum *Hvordan pornografiens udbredelse påvirker pigers og drenges opfattelse af køn.* Verkætlanin hevur til endamáls at kanna, hvørjar royndir og hvørja áskoðan, norðurlendskir ungdómar hava, tá talan er um pornografi og seksualitet. Tað er NIKK, Nordisk Institut for kvinde- og kønsforskning, sum stendur fyri verkætlanini eftir boðum frá Nordisk ministerråd.

Tveir føroyskir granskarar standa fyri kanningini í Føroyum.

**Javnstøðunevndin og norðurlendskt samstarv**
Forkvinnan í Javnstøðunevndini er við í samstarvi millum norðurlendskar javnstøðunevndir. Tey hittast eina ferð um árið. Í 2004 var fundurin í Keypmannahavn. Á skránni vóru framløgur um virksemið síðani seinasta ársfundin, fyrilestrar og kjak.

## Bústaðarmál

**EK-BYGG**
Føroyar hava luttikið í samstarvinum í EK-BYGG, tað er embetsmannskommitteen for samarbete inom byggsektorn, síðani á vári 2003. Samstarvið hevur fyrst og fremst verið nýtt til at fáa atgongd til vitan og royndir úr hinum Norðurlondunum, eins og samstarv eisini er fingið í lag á bústaðarpolitiska økinum.

Í sambandi við ársfundin í Norðanlandaráðnum, luttók Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður, á ráðharrafundi hjá norðurlendsku bústaðarmálaráðharrunum. Á skránni vóru m.a. hesi evni: By- og boligpolitik, herunder social boligpolitik, problemer omkring center og periferi, nedbrydning af grænsehindringer imellem de nordiske lande, de baltiske land og Polen på byggeområdet samt andre aktuelle boligpolitiske emner.

**Samstarv**
Í skrá síni fyri norðurlendska samstarvið í 2004, hevur íslendski formansskapurin lagt stóran dent á at menna útnorðurlendska samstarvið. Á bústaðarpolitiska økinum hevur í hesum sambandi áður verið heitt á Føroyar um at gera ítøkilig uppskot til, hvussu hetta samastarv kann mennast.

Fyrsta ítøkiliga úrslitið av samstarvinum var eitt sonevnt arbeiðsseminar um, hvussu bøtast kann um fólka- og bústaðarhagtøl í útnorðri. Tað varð hildið í Reykjavík í januar 2005, har ljós varð varpað á støðuna í teimum trimum londunum. Ítøkiliga úrslitið av samstarvinum var eitt tilmæli um, at Hagstova Íslands og Hagstova Føroya taka stig til eina greining av, hvussu ein fólka- og bústaðarteljing kann fremjast á skynsamasta hátt.

## Narkotika

**EK-Narko**
Almanna- og heilsumálaráðið hevur luttikið á fundum í MR- og EK-Narko síðani mars 2003 (Nordisk Ministerråd for Narkotikaspørgsmål og Embedsmandskomiteen for Narkotikaspørgsmål). Ein fulltrúi luttekur vegna Almanna- og heilsumálaráðið á fundunum.

Skipað verður vanliga fyri tveimum fundum árliga: einum EK-Narko fundi og einum MR- og EK-Narko fundi. Í 2005 verða tveir EK-Narko fundir og eingin MR-Narko fundur. Fundirnir verða hildnir 9. og 10. mai í Føroyum og í Danmark í oktober.

Endamálið við samstarvinum í MR- og EK-Narko er at viðgera mál og átøk, sum á einhvønn hátt eru tengd at narkotika – herundir kunning um narkotikapolitisk átøk í Norðurlondum. Norðurlendskur narkotikapolitikkur hevur nógvar felags trupulleikar at dragast við, og hevur hetta við sær, at neyðugt er við yvirskipaðum politiskum raðfestingum, altjóða samstarvi, samstarvi millum myndugleikar og førleika- og kunningarbýti landanna millum.

Norðurlond hava leingi samstarvað á narkotikaøkinum. Í hesum samstarvi læra Føroyar av royndunum hjá hinum londunum og kunnu fylgja gongdini í átøkum o.ø. viðvíkjandi narkotika, narkotikafyribyrging, viðgerðarmøguleikum og tilboðum annars til rúseitursmisnýtarar.

MR- og EK-Narko samstarva við m.a. PNT (Polis och Tull i Norden) og NAD (Nordiska Namden for Alkohol- och Drogforskning).

Grundarlagið undir samstarvinum í MR- og EK-Narko er ein virkissætlan fyri tíðarskeiðið 2001-2005. Høvuðsøkini í hesi ætlan eru:

- samstarv, kunnleika- og vitanarbýtið landanna millum um átøk móti narkotikamisnýtslu
- at betra um samstarvið við nærumhvørvið hjá Norðurlondum, tvs. Estland, Letland, Litava og norðurvestur Russland
- samstarv, kunnleika- og vitanarbýti v.m. í evropeiskum og altjóða felagsskapum, eisini at samansjóða norðurlendsku sjónarmiðini viðvíkjandi narkotika í slíkum felagsskapum
- virkisætlanir verða orðaðar árliga
- frágreiðingar um gongdina við virkisætlanunum verða gjørdar árliga

## NOMESCO og NOSOSCO

Almanna- og heilsumálaráðið luttekur í norðurlendska samstarvinum um hagtøl í NOMESCO (Nordic Medico Statistical Committee) og NOSOSCO (Nordic Social Statistical Committee). Hetta eru nevndir undir Norðurlandaráðnum, sum hava ábyrgdina av at samskipa hagtølini innan ávikavist heilsu- og almannaøkið. Nevndirnar hava til endamáls at seta í verk verkætlanir, lutvíst fyri at gera hagtølini betur hóskandi at samanbera og lutvíst fyri at tryggja, at kunnleikin á hagtalsøkinum í Norðurlondum verður nýttur á besta hátt. Báðar nevndirnar geva út árligar frágreiðingar við hagtølum um almanna- og heilsuøkið, men eisini verða útgivin úrslit frá serligum verkætlanum, kanningum o.s.fr.

Føroyar hava fingið limaskap í báðum nevndum í 2004, men hava tó í fleiri ár latið heilsuhagtøl til NOMESCO og havt umboðan í útgávubólkinum í NOMESCO. Føroyska luttøkan í NOSOSCO er nýggj, og verða føroysk almannahagtøl fyrstu ferð við í frágreiðingini, sum verður útgivin á heysti í 2005. Eitt umboð fyri Almanna- og heilsumálaráðið luttekur á fundi 2-3 ferðir árliga í hvørjari nevnd.